# Føroyingar aftur pláss á Journalist Háskúlanum



**Tey bæði plássini, sum vóru garanterað føroyingum, sum kláraðu upptøkuroyndina á Danmarks Journalist Højskole í Århus, mistu vit í fjør. Síðani hevur Mentamálaráðið strongt á, fyri at fáa kunngerðina broytta, og frá september 2008 hava føroyingar aftur tvey pláss tryggjaði á skúlanum**

POLITIKKUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Í fjør mistu føroyingarnir tey bæði plássini á Journalist Højskolen í Århus. Tvey pláss, sum vóru tryggjaði føroyingum pláss á skúlanum, um teir altso kláraðu upptøkuroyndina.

Tað var Danmarks Journalist Højskole, sum bað danska undirvísingarmálaráðið um at gera broytingar í eini kunngerð. Broytingar sum høvdu við sær, at tey bæði plássini, sum vóru tryggjað føroyingum, sum stóðu upptøkuroynd skúlans, fullu burtur og hvurvu.

Í Føroyum var stór misnøgd við hetta. Millum annað hevur verið ført fram, at føroyingar eru munandi verri stillaðir enn danir í slíkum royndum, tí alt er á donskum og snýr seg í stóran mun um donsk viðurskifti. Hetta fekk Mentamálaráðið at taka málið upp, og síðani hava tey strongt á danska undirvísingarmálaráðið, um at fáa hesa kunngerð broytta aftur. Í dag kann Jógvan á Lakjuni, Mentamálaráðharri, vátta, at hetta hevur eydnast teimum.

– Vit hava fingið danska undirvísingarmálaráðið at broyta kunngerðina, soleiðis at vit aftur eiga tvey pláss á skúlanum, sigur Jógvan á Lakjuni.

Broytingarnar í kunngerðunum vera galdandi frá september í ár. Tað merkir, at tey sum fara til upptøkuroynd í ár, ikki eru umfataði av hesi broyting. Men frá skúlaársbyrjan 2008 eiga føroyingar aftur tvey pláss á skúlanum til teir næmingar, sum standa upptøkuroyndina hjá Danmarks Journalist Højskole.



*– Vit hava fingið danska undirvísingarmálaráðið at broyta kunngerðina, soleiðis at vit aftur eiga tvey pláss á skúlanum, sigur Jógvan á Lakjuni*

Vit fara undir nýggja kapping í morgin

Annar vinnarin er drigin í kappingini um

Eina DELL Farteldu
við
breiðbandstelefon og beinara
og
ókeypis breiðbandshald í 3 mánaðir

Tann hepni hesaferð var: Tróndur Salberg Olsen í Kollafirði

Tá ið várljósið kemur aftur til okkara, og eydnan smílist við, er lívið deiligt. Eydnan smíltist um vikuskifti, tá ið hon setti Balslevs Timburhandil í fokus, zoomaði inn á goymsludeildina og valdi sær Trónd burturúr at vinna allan samskiftispakkan.

iConcept ynskir tær hjartaliga til lukku við vinninginum.




Ein TÆNASTA frá iConcept

FlatRate.fo
tel. 60 60 60